# Størsta upplivingin var Wembley




*Dreymurin um at spæla á Wembley gjørdist veruleiki, tá Blackpool og Claus Bech Jørgensen í vár spældu play-off finalu*

**Sum fyrsti føroyingurin slapp Claus Bech Jørgensen í vár at spæla á Wembley. Og tað gjørdi ikki dagin verri, at Blackpool í sama dysti vissaði sær rættin at spæla í næst bestu ensku deildini**

Við mest sum støðugum plássi millum teir fyrstu ellivu eigur Claus Bech Jørgensen sín stóra lut í, at Blackpool er væl ávegis at bíta seg veruliga fast í næst bestu ensku røðini.

Tó at heilur hópur av liðum stríðist fyri at halda sær omanfyri niðurflytingarstrikuna, so tykjast avrikini hjá Claus og teimum støðugt at vera av somikið góðum slag, at tað neyvan verða teir, sum í seinsta enda standa við Svartaperi.

Tað var annars ikki bara stuttligt, tá Claus valdi at skifta til Blackpool. Eftir fýra ár í Coventry, har tað tó ofta var so sum so við spælitíðini, varð sáttmáli skrivaðu við Blackpool um júst sama mundi, sum føroyska landsliðið var í Skotlandi. Og tann veruleikin, at spælarin samráddist á eini landsliðsferð, varð av mongum sæð sum ein orsøk til, at vátt kom í reiðrið millum spælaran og Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjara.

Tað tóktist eisini vera eitt fet eftir hæli, tá Claus fór eina deild niður, men í Blackpool hevur gingið støðugt framá. Við einum flottum endaspurti vann liðið seg í sonevnda play-off bólkin, og á sjálvasta Wembley eydnaðist Claus og liðfeløgunum at vinna seg upp í Championship-deildina.

- Fáa vit tilgongd av einstøkum sterkum spælarum, so skuldu vit kunna staðið okkum, segði Claus í viðtali við Sosialin, tá uppflytingin var veruleiki. Og tann spádómurin hevur higar til passað.

Men kappingin er hørð. Millum liðini, sum Blackpool stríðist við í niðaru hálvu av talvuni, eru Cardiff og Barnsley, sum hava vunnið á eitt nú Liverpool, Chelsea og Middlesbrough í steypakappingini.

----------------------------------------

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

# Yvirliving er málið

**Eftir fleiri ár við støðugari framgongd er setningurin hjá Lyngby nú at halda sær í donsku SAS-liguni**

Síðani Lyngby á sinni fór á húsagang fyri nøkrum árum síðani, hevur gongdin hjá felagnum mest sum støðugt verið ein veg – nevnliga uppeftir.

Fyribils hæddarpunktið kom í fjør, tá felagið aftur vann sær atgongd til donsku superliguna, sum teir seinast høvdu sæð í 2002. Men har hevur tilveran ikki verið nakar dansur á rósum.

Hóast Lyngby støðugt hevur talst millum fremstu klekingardeplarnar í Danmark, so verða hesir ikki til superligu-spælarar av sær sjálvum. Og ofta er veruleikin eisini, at stóru talentini verða tikin av ríkari og sterkari feløgum, tá Lyngby hevur gjørt sín part av klekingararbeiðinum.

Nú superligan er veruleiki, er fulltíðar yrkisfótbóltur tó eisini komin á skránna hjá Lyngby, men tað er tó ikki galdandi fyri Christian Lamhauge Holst. Tað stóð honum annars í boði, men í fyrstu atløgu ynskti áleyparin at nema sær útbúgving við síðuna av fótbóltinum.

Christian er partur av sterka talentskúlanum hjá Lyngby, og hann hevur verið partur av liðnum í støðugu framgongdini móti superliguni. Og hann er framvegis ein sera týðandi partur av liðnum.

Hartil er annar hálvur føroyingur eisini komin til felagið. Tem Hansen, sum í fjør spældi við Fremad Amager, gjørdi av at skifta upp til superliguna heldur enn niður í triðbestu deildina. Og hóast hann enn ikki hevur bitið seg fastan á liðnum, so hevur Tem sagt, at hann sær hetta sum sín møguleika til meira superligubólt í framtíðini.

Danska superligan er farin í gongd aftur. Við evstamark okkara høvdu bláu víkingarnir júst tapt 4-1 móti FCK, og fjarstøðan upp til bjarging var heili níggju stig. So einki er at ivast í, at stríðsandin, sum serliga Christian hevur víst á føroyska A-landsliðnum, verður neyðugur, um várið skal bjarga superligutilveruni.




*Christian Lamhauge Holst hevur verið millum lyklaspælararnar hjá Lyngby, sum hevur havt tað trupult, nú felagið aftur er við í fremstu røð*

----------------------------------------

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

## Vilja úr Danmarks-seriuni

**Fótbóltstilveran í Svendborg er ikki tann sama, sum í Noreg, Onglandi ella Íslandi. Men Julian Johnsson stríðist við liðfeløgunum fyri at vinna seg upp í donsku 2. deild**



Krossbandsskaðin, sum Julian Johnsson fekk í 2005 hevði kanska við sær, at stríðsmaðurin hjá føroyska landsliðnum ongan tíð aftur kom á heilt sama støði, sum hann hevði verið á.

Hóast ein einstakur A-landsdystur kom á kontina aftur, so rúgvaði spælið við leðurkúluni ikki longur tað sama, og seinastu tíðina hevur hann havt eina rímiliga friðarliga tilveru í Svendborg, sum spælir í Danmarks-seriuni.

Her hevur liðið tó ikki ætlanir at verða verandi. Nú farið verður undir seinnu kappingarhálvu, er Svendborg næst ovast í sínari røð, og tí er málið heilt víst at vinna sær sæti í donsku 2. deild, tá farið verður undir nýtt kappingarár.

Og higar til hevur tað verið við Julian Johnsson í einum sera týðandi leikluti. Somikið týðandi, at Julian í heyst varð kosin sum besti spælarin hjá liðnum, og tað er einki at ivast í, at felagið hevur tørv á bæði landsliðsroyndunum og arbeiðsavrikinum frá føroyska slítaranum, um teir skulu vinna seg enn longur upp í donskum fótbólti.

----------------------------------------

*Jákup Mørk*